# Áarstova byrjar av nýggjum

**Hotel Føroyar samtakið hevur í dag yvirtikið raksturin av matstovuni Áarstova. Samtakið rekur framman undan Glasstovuna á Hotel Føroyum, Brasserie á Hvonn og Sushi á Etika.**

Leo Poulsen

Tað verður Winnie Simonsen, ið áður var leiðari av Etika, sum skal standa fyri dagliga rakstrinum í Áarstovu.

Winnie sær stórar møguleikar í hugnaliga umhvørvinum, og hon roknar við, at tað fyri ein stóran mun verða ung pør, sum verða kundarnir.

- Hølini eru ógvuliga hugnalig og leggja upp til ein romantiskan døgurða, so eg rokni við nógvum ungum pørum. Men eg vænti eisini nógv eldri koma at vitja, sigur Winnie Simonsen.

Áarstova liggur eisini væl fyri og hevur áður verið rópt portrið til havnina, so dagligi leiðarin væntar eisini, at tey far at síggja nógv ferðafólk í summar.

- Matskráin verður í stóran mun føroyskur matur, bæði klassiskur og nýhugsandi, og matarskráin verður skift annan hvønn mánað, sigur Winnie Simonsen, sum altso byrjar í nýggja starvinum sum liðari aav Áarstovu í dag.



*Winnie Simonsen, sum hevur verið dagligur leiðari á Etika, skal n´ðu standa fyri matstovuni Áarstova*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Skifti starv eftir 25 ár - men fór ikki langt

Nú ein dagin var stór móttøka á føroyska sjúklingahotellinum, Tórshavn

Orsøkin til hesa løtuna á hotellinum var, at Elionora Olsen er farin úr starvi í eftir at hava verið sjúklingavegleiðari í samfull 25 ár.

Heilt fitt av fólkið var samankomið at biðja henni farvæl og takka fyri drúgva og holla tænastu og har vóru eisini umboð fyri grønlendingar, sum arbeiða á Ríkissjúkrahúsinum.

Hotel Tórshavn varð stovnað í Gothersgade í 1976 sum eitt hotell fyri føroyingar, sum máttu til Keypmannahavn at leita sær læknasjálp fyri sjúkur, føroyska heilsuverkið ikki var ført fyri at viðgera, og fyri tey avvarandi hjá hesum sjúklingum.

Fyristøðukvinna og stigtakari varð Karolina Petersen, men síðani keypti ein privatur grunnur hotellið og hjúnini, Jonny og Andreas, tóku við leiðsluni.

Í 1986 varð Hotel Tórshavn lagt undir føroyska heilsuverkið. Í 2000 flutti hotellið í Tåsingegade og tað eitur nú Sjúklingaheimið Tórshavn.

Elionora varð sett í starv 1. januar 1986 og síðani 2006 hevur hon havt skrivstovu á Ríkissjukrahúsinum, sum føroyskur sjúklingavegleiðari.

Elionora Olsen fer nú í starv á Landssjúkrahúsinum, har hon skal vera uttanlandsráðgevari, men hon fer at halda til í somu hølum á Ríkissjúkrahúsinum, hon hevur hildið til í seinastu fimm árini.

Í sama viðfangi takkar Anna Maria Djurhuus, leiðari á Sjúklingaheiminum, fyri gávur, sum tey hava fingið.

- Tá ið teldurnar vórðu stolnar í februrar í fjør, fingu vit 40.000 krónur frá Føroya Arbeiðarafelag, og tá ið flatskermurin bleiv vekk í november 2010, fingu vit 10.000 krónur frá fakfelagssamstarvinum, sigur hon

Í ár hava tey fingið 5000 krónur frá Atlantic Petroleum og harafturat hava vit fingið 50.000 krónur frá Kiwanis.

- Vit eru ógvuliga takksom fyri hesar gávur og eisini allar tær gávur, sum einstaklingir í Føroyum senda okkum. Hetta kemur alt væl við og vit royna at gera okkum ómak fyri at hetta í størsta mun kemur sjúklingunum og teirra avvarðandi til góðar, sigur Anna Maria Djurhuus.


*Elionora Olsen fer úr starvi á Sjúklingaheiminum Tórshavn í Keypmannahavn og í starv hjá Landssjúkrahúsinum, men hon fer framvegins at ráðgeva og hjálpa føroyskum sjúklingum á Ríkissjúkrahúsinum*

# Nýggja Fólkaskúlaráðið skal menna fólkaskúlan

Eirikur Lindenskov

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, hevur tilnevnt limir í eitt nýtt Fólkaskúlaráð, sum skal ráðgeva landsstýriskvinnuni um, hvussu vit fáa ein betri fólkaskúla.

Ráðið skal m.a. koma við tilmælum um at seta í verk royndar- og menningar- og granskingarverkætlanir.

Í fyrsta lagi vil landsstýriskvinnan, at Fólkaskúlaráðið veitir ráð og tilmæli um, hvat eigur at verða gjørt fyri at menna fakliga støðið hjá næmingum, umframt námsfrøðiliga og fakliga førleikan hjá lærarunum og undirvísingarliga leiðsluleiklutin hjá skúlaleiðarunum.

Somuleiðis skal ráðið geva tilráðing um royndar-, menningar- og granskingarverkætlanir á hesum økjum:
- skúlabygnað og royndarætlanir í sambandi við skúlasamstarv
- tímabýtið og lærugreinaskipanin
- námsfrøðiligi leiðsluparturin
- eftirútbúgvingartørv og skipan
- sernámsfrøðiliga økið

Ráðið er soleiðis mannað: Mai Laksafoss Simonsen, Marjun Ziskason, skrivari, Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, Karolina Matras, forkvinna, Jenny Lydersen, samskipari og Tonnie Strøm, Hans Jón Juul Thomsen, Andrass Henriksen, Jákup Eli S. Olsen, Mannbjørn Olsen og Jónleif Johannesen, er ikki við á myndini.

Knýtt at arbeiðinum í Fólkaskúlaráðnum verða tveir serfrøðingar, Niels Egelund og Julius Bjørnson, og ráðið fer eisini at leita sær hjálp hjá øðrum serkønum.

*eirikur@sosialurin.fo*

# Nú skulu ársins leiðarar finnast

Áki Bertholdsen

Nú skal ársins leiðari finnast, bæði í privatu vinnuni og í almennu fyrisitingini.

Tað hendir, tá ið Synergi fyri sjeyndu ferð skipar fyri Ársins Leiðaradegi tann 18 mars.

Einasta treytin er, at talan skal verða um ovasta stjóran ella leiðaran í eini fyritøku, einum stovni ella einum felag - ella talan kann vera um eina nevndarforkvinnu ella ein nevndaformann.

Tá ið vinnarin verður tilnevndur, verður dentur lagdur á, at viðkomandi hevur víst áræði og dirvi, at viðkomandi harafturat er nýhugsandi og hevur givið øðrum leiðarum íblástur.

Somuleiðis skal viðkomandi hava verið sjónskur í almenna rúminum og soleiðis gjørt vart við seg sum leiðara.

Øll kunnu senda uppskot inn og so verður tað ein dómsnevnd, sum tekur endaliga støðu.

Ein Ársins leiðari skal veljast í privatu vinnuni og ein í almennu fyrisitingini fyri at vísa á týdningin av, at vit hava góðar leiðarar bæði í tí privata og í tí almenna.

Í 2009 vóru taå Hjalti í Jákupsstovu, vm og Regin Jacobsen, sum vórðu valdir ársins leiðarar.

*aki@sosialurin.fo*